

# Tróndur Patursson 65 ár

Fyrsta mars fylti okkara kendi listamaður, Tróndur Patursson í Kirkjubø, 65 ár.

Tróndur er fjølbroyttur listamaður, hann er bæði málari og myndahøggari v. m. Hann er útbúgvin í Danmark og Norra innan ymiskar listagreinir, umframt at hann hevur verið námsferðir í fleiri londum.

Síðan Tróndur hevði sína fyrstu framsýning á ólavssøku 1958, hevur hann havt nærum óteljandi framsýningar bæði í Føroyum og uttanlands.

Síðan síðst í 80-unum hevur hann gjørt nógv við at mála á glas. Hann hevur sín egna ovn á verkstaði sínum í Kirkjubø, sum verður brúktur til endamálið.

Hansara vatns- stál- og steinskulpturar eru nógvastaðni at síggja, umframt alt tað hann hevur gjørt úr glasi.

Eisini hevur hann verið ymiskar ferðir við granskaranum og høvundanum Tim Severin, sum t.d. ferð Brandans úr Írlandi til Amerika (1977-78), ferð Sindbads Sjófara úr Oman til Kina (1982-83), ferð Jasons úr Hellas til Georgia við Svartahavið (1985), China Voyage úr Japan til Amerika yvir Stillahavið (1995), Spice Islands Voyage í Indunesia (1996).

Tróndur Patursson er í dag í høgum metum bæði sum málari og myndhøggari. Fremst av øllum er hann víðagitin fyri sínar glasmálningar og spegils-/glasverk. Hann eigur ein týðandi lut í menningini av føroyskari list.

*-red*

# Pernille Aalund til Føroya



Í vikuni kemur navnframa Pernille Aalund til Føroya. Hon er ein av fyrilestrarhaldarunum til stóra 8. mars tiltakið í Norðurlandahúsinum 7. mars.

Pernille fer at røða um bók sína, sum hon kallar Wauw-effektin. Orðini verða sjálvandi serverað í røttum Pernille-stíli. Eitt gott power-talk og nógv bæði til gaman og til álvara.

Harafturat kemur Benja Stig Fagerland. Hon er kend fyri sínar mongu suksé'ir í verkætlanum at fáa fleiri kvinnur í leiðslur og nevndir, serstakliga í Noregi.

Atgongumerki kunnu keypast á www.kvinna.fo og eisini í Telebúðunum kring landið.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jógvan Pól Johan Egholm**, vanliga nevndur Jógvan Páll, ættaður úr Leynum, andaðist í Ålborg, mánadagin 23. februar, 39 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju týsdagin klokkan 14. Tey ið vilja minnast Jógvan Páll, kunnu lata børnunum eina peningagávu, konta í Eik banka. Sungið verður úr sálmabókini.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaða mamma, vermamma og omma

**Poula Mohr**
Fuglafjørður

andaðist á Vesturstovu leygarkvøldið 28. februar, 82 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Siloa mikudagin 4. mars kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Hans, Poul Jákup og Øssur**

Tey, ið vilja minnast Poulu, kunnu lata eina peningagávu til Siloa.

†

Kunngjørt verður, at okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

**Edith Dam**
Argir

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 28. februar, 65 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin kl. 19.00.
Jarðarferðin verður úr Argja kirkju mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Meinhard**
**Thomas, Eyðhild og Bogi**

Tey, ið vilja minnast Edith, kunnu lata eina gávu til Føroya Felag móti Krabbameini, konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi og abbi okkara

**Gestur við Høgadalsá**
úr Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin, 67 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mánakvøldið kl. 18.00
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Karin, Hanus, Turið, Bjarni, Fróði og Maria**

Tey, ið ynskja at minnast Gest, kunnu lata ungdómsarbeiðinum hjá B36 eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Dagurin**
**Dagurin eitur Albinus**. 2. mars. Simplicius, deyður ár 483. Hann var pávi frá 468.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*